### Danska superligan

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby (S) | 9 | 6 | 2 | 1 | 14 | 4 | 10 | 20 |
| 2 | Esbjerg | 9 | 5 | 3 | 1 | 16 | 9 | 7 | 18 |
| 3 | FCK (M) | 9 | 4 | 3 | 2 | 14 | 9 | 5 | 15 |
| 4 | OB | 9 | 4 | 2 | 3 | 15 | 11 | 4 | 14 |
| 5 | FCM | 9 | 4 | 2 | 3 | 12 | 11 | 1 | 14 |
| 6 | Viborg | 9 | 3 | 4 | 2 | 17 | 15 | 2 | 13 |
| 7 | AGF | 9 | 4 | 1 | 4 | 15 | 16 | -1 | 13 |
| 8 | AaB | 9 | 3 | 2 | 4 | 7 | 9 | -2 | 11 |
| 9 | Frem | 9 | 3 | 0 | 6 | 9 | 16 | -7 | 9 |
| 10 | Herfølge | 9 | 2 | 2 | 5 | 7 | 11 | -4 | 8 |
| 11 | FC Nordsj. | 9 | 1 | 4 | 4 | 9 | 12 | -3 | 7 |
| 12 | AB | 9 | 2 | 1 | 6 | 8 | 20 | -12 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

### Danska 1. deild

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AC Horsens | 9 | 8 | 1 | 0 | 19 | 4 | 15 | 25 |
| 2 | Randers FC | 9 | 7 | 1 | 1 | 24 | 14 | 10 | 22 |
| 3 | Silkeborg | 9 | 6 | 1 | 2 | 21 | 7 | 14 | 19 |
| 4 | Køge | 9 | 6 | 1 | 2 | 21 | 13 | 8 | 19 |
| 5 | Ølstykke | 9 | 6 | 0 | 3 | 23 | 18 | 5 | 18 |
| 6 | Fredericia | 9 | 5 | 1 | 3 | 15 | 11 | 4 | 16 |
| 7 | HFK Sønderj. | 9 | 5 | 0 | 4 | 27 | 17 | 10 | 15 |
| 8 | Skjold | 9 | 4 | 2 | 3 | 20 | 14 | 6 | 14 |
| 9 | FC Nordjylland | 9 | 4 | 1 | 4 | 10 | 13 | -3 | 13 |
| 10 | Fremad Amager | 9 | 3 | 2 | 4 | 15 | 19 | -4 | 11 |
| 11 | B 93 | 9 | 2 | 2 | 5 | 13 | 17 | -4 | 8 |
| 12 | Vejle | 9 | 2 | 2 | 5 | 13 | 20 | -7 | 8 |
| 13 | Nykøbing | 9 | 2 | 1 | 6 | 14 | 19 | -5 | 7 |
| 14 | B 1913 | 9 | 1 | 3 | 5 | 9 | 20 | -11 | 6 |
| 15 | Brønshøj | 9 | 1 | 1 | 7 | 8 | 24 | -16 | 4 |
| 16 | FC Aarhus | 9 | 0 | 1 | 8 | 6 | 28 | -22 | 1 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

### Skotska Premier League

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rangers | 6 | 6 | 0 | 0 | 23 | 5 | 18 | 18 |
| 2 | Celtic | 6 | 5 | 1 | 0 | 16 | 2 | 14 | 16 |
| 3 | Hearts | 6 | 4 | 0 | 2 | 8 | 5 | 3 | 12 |
| 4 | Dundee | 6 | 3 | 1 | 2 | 8 | 5 | 3 | 10 |
| 5 | Dunfermline | 6 | 2 | 2 | 2 | 4 | 6 | -2 | 8 |
| 6 | Hibernian | 6 | 2 | 2 | 2 | 6 | 9 | -3 | 8 |
| 7 | Motherwell | 6 | 2 | 1 | 3 | 6 | 10 | -4 | 7 |
| 8 | Kilmarnock | 6 | 2 | 1 | 3 | 6 | 11 | -5 | 7 |
| 9 | Livingston | 6 | 1 | 2 | 3 | 5 | 10 | -5 | 5 |
| 10 | Aberdeen | 6 | 1 | 1 | 4 | 6 | 11 | -5 | 4 |
| 11 | Dundee Utd. | 6 | 1 | 1 | 4 | 4 | 13 | -9 | 4 |
| 12 | Partick | 6 | 0 | 2 | 4 | 6 | 11 | -5 | 2 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

### Íslendska Landsbankadeildin

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KR | 18 | 10 | 3 | 5 | 28 | 27 | 1 | 33 |
| 2 | FH | 18 | 9 | 3 | 6 | 36 | 24 | 12 | 30 |
| 3 | ÍA | 18 | 8 | 6 | 4 | 27 | 21 | 6 | 30 |
| 4 | Fylkir | 18 | 9 | 2 | 7 | 29 | 24 | 5 | 29 |
| 5 | ÍBV | 18 | 7 | 3 | 8 | 25 | 25 | 0 | 24 |
| 6 | Grindavík | 18 | 7 | 2 | 9 | 24 | 31 | -7 | 23 |
| 7 | Fram | 18 | 7 | 2 | 9 | 22 | 30 | -8 | 23 |
| 8 | KA | 18 | 6 | 4 | 8 | 29 | 27 | 2 | 22 |
| 9 | Þróttur | 18 | 7 | 1 | 10 | 27 | 29 | -2 | 22 |
| 10 | Valur | 18 | 6 | 2 | 10 | 24 | 33 | -9 | 20 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)

# Brøndby framvegis oddalið

**Jón Rói Jacobsen hevði ikki fingið boð at vera við í torføra útidystiunum í Odense leygarkvøldið**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi væl hjá Brøndby IF. Tað tykist ikki sum um Michael Laudrup longur tykist halda seg hava pláss fyri Jón Róa Jacobsen millum teir fyrstu fimtan fyri Jón Róa Jacobsen.

Hjá Brøndby hilnast væl. Teir eru oddalið í superliguni, og leygarkvøldið staðfestu teir sína støðu í fínum fótbóltsdysti í Odense, har tað altíð verður mett at vera rættuliga torført at fáa øll stigini ímóti OB, sum eisini má metast at vera millum tey mest trivaligu í Oyndafirði.

Einasta málið hjá Brøndby skoraði Thomas Kahlenberg, sum er ein av evnaríku ungu Brøndby spælarunum.

Fram ímóti dystarenda royndi OB at trýsta, og talan var eisini um fleiri vandamiklar og næstan vandamiklar støður, sum kortini einki spurdist burturúr. Men tað leikaði hart á frammanfyri Brøndby málverjan, Karim Zaza, sum í fjør var málverji hjá Brøndby.

Esbjerg er framvegis millum toppliðini. Hesa ferð vóru teir á vitjan í Farum, har FC Nordsjælland megnaði 1–1. Liðið hjá Christian Andersen er framvegis millum tey veikastu.

Síðani Søren Kusk fyri einari viku síðani gjørdist venjari hjá illa stadda AaB hevur tað gingið rætta vegin. Fyrst fingu teir javnleik í Brøndby, og hesa ferð vunnu teir 1–0 á heimavølli ímóti FCM, sum annars hevur verið rættuliga væl við í toppinum. Tað hevur eydnast hjá venjaranum at fáa okkum at stríðast fyri søkini, siga spælarar í AaB.

Eisini hjá AGF er tað av álvara farið at ganga rætta vegin. Hesa ferð var AGF á útivølli í Valby ímóti Frem. AGF vann 4–1. Talan var um triðja sigurin á rað og fyrsta útisigurin í hesum kappingarárinum. Hjá Frem stendur ikki so væl til, og Ole Mørch sigur seg hava eyguni eftir nýggjum spælarum.

AB hevði fyri fyrstu ferð Henrik Jensen á venjarabeinkinum. Og tað bar Henrik Jensen væl og virðiliga til at staðfesta, at tað tørvar nógv á liðnum hjá honum, sum skal rættast. AB er framvegis aftast.

# Julian fekk bronsu

**Seinnapartin leygardagin verður steypafinalan hjá ÍA spæld ímóti FH, sum í síðsta umfarinum í landskappingini vann 7–0 ímóti meistaraliðnum úr KR**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Tað eydnaðist ikki hjá Julian Johnsson og liðfeløgunum í ÍA at varðveita silvurplássið. Eftir átjanda umfarið fór FH akkurát framum ÍA og vann silvur. Hvuss hetta akkurát gekk fyri seg kundi kanska tykist rættuliga lítið sannlíkt.

ÍA var á útivølli í Vestmannaoyggjunum, og úrslitið har var 1–1. ÍA legði seg framum, tá ið tað restaðu sjey minuttir, og bara tveir minuttir seinni var støðan 1–1. ÍBV javnaði við brotssparki.

Undan átjanda og síðsta umfarinum lá ÍA til at fáa silvurkrónurnar. Men tað gekk FH, sum ÍA leygardagin skal spæla steypafinalu ímóti, ikki við til. FH hevði á Hafnafirði vitjan av meistaraliðnum KR, sum tær síðstu ferðirnar ikki hevur verið sannførandi, nú meistaraheitið fyri fleiri vikum síðani var komið til høldar.

Tað gekk eisini soleiðis, sum FH vildi hava tað at ganga. FH av Hafnafirði vann 7–0!, sum er heilt óhoyrt. KR spælarar sóu tvær ferðir reytt, og tað er eisini mest sum óhoyrt í Íslandi, at eitt og sama lið í sama dysti fær fleiri útvísingar ímóti sær, og ikki minst tá ið talan er um meistaraliðið, sum átti at havt víst størri áhuga.

Stóri sigurin bar við sær, at FH akkurát gjørdist nummar tvey, meðan ÍA endaði á triðja plássinum. Bæði liðini, FH og ÍA hava 30 stig, men stórsigurin á KR hevur við sær, at FH eigur betri málmun, enn teir í ÍA hava tað. Hjá FH er málmunurin +12, og hjá ÍA er hann +6. Stóra tapið í síðsta umfarinum hevur verið sær, at KR er vorðið meistari við so at siga nevativum skjúttaralista.

Leygardagin í hesi vikuni klokkan 14 lokala tíð fara ÍA og FH at spæla steypafinalu, og tað verður ivaleyst rættuliga spennandi.

Í botninum fluttu Valur og þróttur niður. Valur tapti 6–2 ímóti Fylkir á útivølli, og þróttur tapti 1–0 á útivølli ímóti Fram. Valur hevði tjúgu stig, og þróttur hevði 22 stig ella sama stigatal sum KA av Akureyri. Fyri KA var tað sera týdningarmikið, at teir megnaðu 1–1 í Grindavík í síðsta umfarinum.



*Í seinasta umfarinum fingu Julian og teir bert javnleik móti ÍBV, og so fór FH framum við betri málmuni eftir stórsigurin á meistarunum úr KR*



## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrismálanevndarformaðurin Heini mundi verið sendur heim at vaska hendur »For good«

*Jógvan Lützen*

Í svargrein til mínar viðmerkingar til Heina O. Heinesen í Sosialinum herfyri, fellur Heini í somu grøv sum so mangur, hann hevur onki forsvar, so er bert at leypa á, og tað ger so Heini.

Eg fasthaldi framvegis, at Føroya fólk hoyrdi Heina O. Heinesen úr tingsalinum taka støðu til klaguna frá felagnum Stállínuskip, um at taka fiskiloyvi frá Jógvan S. Hetta var áðrenn klagan nakrantíð kom í landsstýrismálanevndina til viðgerðar, har Heini er formaður.

Eisini minnast vit, tá ið Heini O. Heinesen eftir seinasta løgtingsval bleiv spurdur, hvat hann skuldi brúka formanssessin í landsstýrismaálanevndini til. Jú, svarar Heini, eg skal brúka hann til at kanna landsstýrismannin við fiskivinnumálum, Jørgin Niclasen og fólkaflokkin.

Var talan um eitt land við rættartrygd, har demokratiskar meginreglur vera fylgdar, kom ikki uppá tal at ein parlamentariskt valdur nevndarlimur, og als ikki ein nevndarformaður, við alment kendari forúttiknari støðu, kundi viðgera sama mál. Slíkur persónur er allastaðni enn í Føroyum ógegnigur. Men her á landi sýnist alt at lata seg gera. Eisini, at ein løgtingsvald nevnd, tekur dómsvaldið.

Hvør bleiv so fylgjan av hesum meira enn ivasama dóminum hjá landsstýrimálanevndini. Jú, orðarætt sendur soleiðis í afturtøkuskjalinum frá landsstýrismanninum:

»Avgerðin er grundað á, at landsstýrismálanevndin í skrivi, dagfest 25. juni 2003, til landsstýrismannin í fiskivinnumálum hevur boðað frá, at avgerðin um at lata »Jógvan S« tilsøgn um veiði- og fiskiloyvi var ósaklig, og harvið ólóglig. Landsstýrismaðurin hevur tikið hesa endaligu niðurstøðu til eftirtektar, ásannandi týdningin av leiklutinum hjá landsstýrismálanevndini í teirri politisku skipanini, og at løgtingið hevur sett landsstýrismálanevndina at hava eftirlit við landsstýrinum«.

Hetta er greið tala, sum allir føroyingar skilja, um ikki heilt allir, so rokni eg við, at tað í mesta lagi eru upp til tríggjir sum ikki skilja, helt allir limir í landsstýrismálanevndini.

Heldur ikki eitt einasta orð frá Heina um, at allur tjóðveldisflokkurin alment, inklusivt hann sjálvan, meira enn tað einu ferðina kravdi fiskiloyvi tikið frá Jógvan S. Var fiskiloyvið ikki tikið og báturin lagdur við brestin, tók ein samdur tjóðveldisflokkur stig til at misálit bleiv reist í løgtinginum móti landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Og nú sigur Heini O. Heinesen seg onga skuld hava í at Jógvan S misti fiskiloyvi. Eg meini tað.

Heini O. Heinesen, - um hesin pástandurin um misálit frá tjóðveldisflokkinum vent ímóti Jacob Vestergaard ikki er rættur, kann tú so alment avsanna hann?

Vit minnast eisini Heina í øðini, tí at landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hevði dittað sær at spurt advokat, uttanfyri almennu fyrisitingina, um eitt juridiskt responsum í »Jógvan S-málinum«. Okkurt mundi vera, Heini bleiv so illur.

Ikki bert løgfrøðin hjá fiskimálastýrinum og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum er ósamd í niðurstøðuni hjá landsstýrismálanevndini.

Tað hevur víst seg, nú vit hava fingið alment innlit í hetta responsum frá privata advokatinum, at advokaturin beinleiðis mælir fiskimálastýrinum frá at taka fiskiloyvi frá Jógvan S. Og hvør er so orsøkin? Jú, onki ólógligt er farið fram í málinum um fiskiloyvi til Jógvan S, er advokatniðurstøðan til landsstýrismannin.

Síðan hava allar stóru advokatskrivstovurnar í Føroyum víst á, at niðurstøðan hjá landsstýrismálanevndini er skeiv og órættvís.

Er nakað at siga til, at vit ivast stórliga í juridiska førleikanum hjá landsstýrismálanevndini?

Elegant loypir Heini um hesar veruleikar, ístaðin herjar hann á, fyrst á landsumsitingini og síðan á landsstýrimannin og løgmann og til seinast á felagið sum eigur Jógvan S. Hann brikslar okkum óreglusemi og at vit hava dult sum mansmorð, at vit hava eitt fiskiloyvi.

Hóast eg als ikki kenni meg at standa Heina O. Heinesen til svars, skal eg tó lata hann vita, at áðrenn Ågot 1 nakrantíð kom uppá tal, var arbeitt við tilboðum um ymisk skip, harímillum okkurt tilboð sum fleiri onnur reiðaríir eisini høvdu fingið frá føroyskum reiðara, hetta var langt áðrenn løgtingsvalið 30. apríl 2002.

Men var tað ikki júst løgtingsvalið 30. apríl 2002, sum er eymasta líktornið hjá Heina O. Heinesen? Tað var við hetta valið, at tjóðveldisveljarar í Klaksvík og her umleiðir, sendu Heina heim til Kunoyar »For good«. Kunoyingurin fekk færri persónligar atkvøður í Klaksvík enn Karsten Hansen, men lukkutíð fyri Heina, og miklan ampa fyri onnur, bleiv hann bjargaður úr politisku avgrundini, við atkvøðum uttanfyri Klaksvík.

Tað er sostatt um eitt hangandi hár, at valattentatið frá beinharða stalinistiska miðstaðarvonginum í tjóðveldisflokkinum eydnaðist. Hetta uppdagaði høvuðsmaðurin sjálvandi ikki. Men ístaðin fyri at revsa teir røttu, fann Heini sær okkum fýra klaksvíkingar og ein haraldssundsmann at hevna seg inn á, vegna atkvøðumissin. Vertin á um 14 fiskimenn vóru sendir arbeiðsleysir til hús og ein ársinntøka minni til hvørt hesi fiskimannaheim.

Og enn minni man tað hava at týða fyri tjóðveldismannin at eitt skip fyri 5-6 mió. kr. bleiv bundið við kei, men vit fáa at síggja, livst so spyrst.

Í hesu vikuni verður stevningin latin inn, tað er siðvenja at binda frið ímeðan rætturin arbeiðir, tað ætlað vit eisini um vit fáa frið fyri ósannindum.








*Her standa teir við einum kransi, sum hevur verið rundanum ein av motorunum. Skiparin, Sveinur Poulsen við yngsta soninum, Páll Hermann á knænum og maskinmaðurin, Álvur Thomsen, við maskinbyrsuni*

# Niels Pauli fekk flúgvara í trolið

**Tað kemur fyri, at trolarar fáa ymiskt í trolið, sum onki hevur við fisk at gera**

KRÍGSLEIVD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Havið goymir so mangt. Tað munnu ikki minst, teir, sum dag og dagliga trola á havsins grunnum sanna, tí tað kemur meiri enn so fyri, at trolarar fáa ymiskt í trolið, sum liggur og rekist á havsins botni, men sum onki hevur við fisk, ella natúruna annars, at gera.

Tað fekk ikki minst manningin á hvalbiartrolaranum, Niels Paula, at síggja, seinasta túr teir vóru úti.

Tá ið teir togaðu trolið, sóu teir, at leivdirnar av einum flogfari hekk í trolinum.

Tað mesta av skrokkinum hekk uppi í, men tá ið trolið kom at borið, datt skrokkurin av og fór til botns aftur.

Ymsar leivdur av flogfarinum vórðu kortini hangandi og vórðu bjargað inn á dekkið.

Ímillum lutirnar, sum Niels PauliBjargaði á dekkið, voru nakrir stórir tangar av gummi, eitt hylki rundanum motorin, ein dynamo, ella okkurt sovorðið, ein maskinbyrsa og aðrir lutir.

So tað er eyðsæð, at talan er um eitt flúgvara frá krígnum.

Tað var á eini leið vestanfyri ímóti íslandsmarkinum, at Niels Pauli fekk flúgvaran í trolið. Skiparin, Sveinur Poulsen, sigur at á eini ávísari leið har vesturi, liggur nógv og rekist á botninum og har fáa trolararnir javnan ymsar lutir í trolið, sum kundi bent á, at teir koma av flúgvarum.

Men tað var ikki akkurát á hesi leiðini, at Niels Pauli fekk hendan flúgvaran.

Tað sæst á lutunum, at talan hevur verið um ein stóran flúgvara, kanska eitt bumbuflogfar.

Men har var onki, sum kundi sagt, hvaðani flúgvarin var.

Einasta ábendingin um, hvaðani flúgvarin kann vera, er, at á dynamo'ini er ein pláta við við nøkrum upplýsingum á og har stendur, at hon er gjørd í New Jersey í USA.

Enn er óvist um tað ber til at eyðmerkja flúgvaran útfrá teimum fáu upplýsingunum, sum eru.

Hetta er aðru ferð, at Niels Pauli hevur fingið flúgvara í troli. Fyri nøkrum árum síðani fingu teir ein flúgvara í troli í Hattonbank. Tað ferðina fingu teir mestsum allan skrokkin í troli. Talan var um ein lítlan flúgvara, men hann var ikki frá krígnum, tí tað var ein vanligur flúgvari.



*Hesir báðir gummitangarnir vóru eisini ímillum leivdirnar av flúgvaranum, sum tað eydnaðist at bjarga*



*Eina dynamo funnu teir eisini og á henni var ein pláta sum segði, at hon varð gjørd í New Jersey í USA*